UTTAN ÚR HEIMI

## Fleiri húsagangir

Ikki færri enn 2.509 danskar fyritøkur fóru á húsagang í fjør og máttu gevast við virkseminum, og tað er tað mesta seinastu átta árini.

Men hóast hetta merkir, at nógv fólk hava mist arbeiði, so er gongdin eisini eitt tekin um, at marknaðarbúskapurin virkar, sigur búskaparfrøðingurin Jørn Thulstrup, sum er stjóri á Institut for Konjunkturanalyse. Hann sigur, at nógvar danskar fyritøkur vórðu stovnaðar í kjalarvørrinum á teirri stóru KT-menningini, og at tey flestu væntaðu at fáa nógv burturúr. Men hækkandi lønarlag í Danmark og onnur viðurskifti hava gjørt, at fyritøkurnar mistu kappingarførið og at enda noyddust at lata aftur.

Jørn Thulstrup vísir í hesum sambandi á, at lønarlagið í Danmark er hækkað nógv meiri enn lønarlagið í øðrum evropeiskum londum.

## Stevna Shell

Tað kom ógvuliga óvart á olju- og fíggjarheimin, tá oljufelagið Shell fyrr í hesum mánaðinum kunngjørdi, at leiðirnar hjá felagnum hava 20 prosent minni olju enn mett frammanundan.

Kunngerðin hevði alt fyri eitt við sær, at partabrøvini í Shell fullu sjey prosent í virði, og nú krevja fleiri partaeigarar endurgjald frá felagnum. Eitt amerikanskt sakføraravirki hevur stevnt Shell við kravi um, at øll, sum keyptu partabrøv í felagnum frá 3. desember í 1999 til 9. januar í ár, skulu hava rætt til endurgjald, tí grundarlagið undir partabrævakeypinum var ikki tað, sum felagið hevði upplýst.

Serfrøðingar vænta kortini, at tað verður trupult hjá amerikonsku sakførarunum at fáa viðhald í rættinum. Tony Alves í bretska fíggjarfelagnum Investec sigur við BBC, at Shell hevur ikki gjørt annað at staðfesta, at íløgur, sum felagið hevur gjørt í Nigeria og Avstralia, fara neyvan at kasta tað av sær, sum felagið hevði roknað við, og tað er ikki annað, enn onnur oljufeløg hava gjørt fleiri ferðir, sigur hann.

## Microsoft fær risastóra bót

ES-nevndin fer ætlandi einaferð í vár at áleggja amerikonsku fyritøluni Microsoft at gjalda eina risastóra bót, tí nevndin vil vera við, at fyritøkan hevur misnýtt sína støðu á marknaðinum.

BBC vildi í gjár vera við, at Microsoft kann fáa eina bót upp á fleiri milliardir evrur, men onnur halda, at bótin verður einastaðni ímillum 100 og 500 milliónir evrur. Tað er tó eingin ivi um, at Microsoft fer at kæra avgerðina hjá ES-nevndini, sama hvussu stór bótin verður, men summi halda, at Bill Gates kanska fer at royna at gera eina neyðsemju við nevndina, áðrenn málið kemur so langt.

Amerikanskir dómstólar hava meiri enn einaferð staðfest, at Microsoft hevur misnýtt sína marknaðarstøðu, men higartil hevur tað eydnast fyritøkuni at fáa semju í lag við saksøkjararnar. Eitt nú gjørdi felagið semju við myndugleikarnar í statinum Kalifornia í fjør, ein semja, sum kostaði Microsoft 1,1 milliard dollarar. Í øðrum líknandi málum hevur Microsoft goldið 450 milliónir dollarar í sambandi við semjur.

## Sendi tveir teldupostar

Fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton sendi bara tveir teldupostar tey átta árini, har var forseti.

Í savninum hjá Clinton Presidential Foundation eru 40 milliónir teldupostar frá forsetatíð hansara, men sjálvur hevur hann bara sent tveir teirra. Á øðrum hevur hann ikki skrivað eitt einasta orð, tí hetta var bara ein roynd at vita, um forsetin dugdi at senda ein teldupost, og um útgerðin riggaði, sigur Skip Rutherford, sum er leiðari á Clinton Presidential Foundation. Sambært Skip Rutherford hevði Clinton ikki stundir til at sita og skriva teldubrøv. Hann roknar heldur ikki við, at núverandi forsetin, George W. Bush, situr og skrivar teldubrøv um dagarnar.

Hitt teldubrævið ella rættari sagt tað einasta, sum Clinton skrivaði, var til senatorin og fyrrverandi rúmdarmannin John Glenn, og hann kann tí rósa sær av at vera tann fyrsti amerikanarin, sum var úti í rúmdini, og at hann hevur tað einasta teldubrævið, sum Bill Clinton skrivaði í sínari forsetatíð.

# John Kerry vann aftur



*John Kerry vann eisini í New Hampshire, men tann veruliga royndin verður í næstu viku, tá uppstillingarval verður í sjey statum*

**Við 39 prosentum av atkvøðunum vann senatorurin John Kerry uppstillingarvalið í New Hampshire. Hetta var annað valið og annar sigurin hjá Kerry**

UPPSTILLING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað gongur strúkandi hjá John Kerry, sum hevur sett sær fyri at bjóða George W. Bush av á forsetavalinum í heyst.

Á uppstillingarvalinum í New Hampshire fekk John Kerry 39 prosent av atkvøðunum, meðan næsti maður, Howard Dean, fekk 26 prosent. Hini valevnini fingu munandi minni. Wesley Clark fekk 13 prosent, John Edwards 12, og Joseph Lieberman fekk níggju prosent.

John Kerry segði í gjár, at sigrar hansara í Iowa og New Hampshire vísa, at tað ber til at koma afturíaftur. Við hesum sipaði hann til, at fyri bara einum mánað síðani var tað eingin, sum helt, at hann hevði nakran møguleika at vinna eitt uppstillingarval.

Politiskir eygleiðarar í USA siga, at hóast John Kerry hevur fingið eina stak góða byrjan í uppstillingini hjá demokratunum, eru ikki allar súður syftar enn. Teir vísa á, at í 1992 tapti Bill Clinton uppstillingarvalini í júst Iowa og New Hampshire, men at hann kortini gjørdist forsetavalevni hjá demokratunum.

Í næstu viku verður uppstillingarval í sjey statum, og tá kemur hann veruliga royndin hjá John Kerry, siga eygleiðararnir.

# 16 ára gomul genta hevur røntgen-eygu

**Russisk vísindafólk eru ørkymlað av, at ein 16 ára gomul genta eftir øllum at døma hevur evni til at síggja ígjøgnum mannakroppin**

SJÁLDSOM EVNI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá læknarnir á einum barnasjúkrahúsi í russiska býnum Saransk kannaðu ta 16 ára gomlu Natasju Demkina, komu teir eftir, at hon hevur eini sera ajáldsom evni. Gentan var før fyri at síggja gøgnini í einum mannakroppi uttan at nýta røntgen ella ultraljóð.

Blaðið Izvestija skrivaði í síðstu viku, at aðrir læknar, sum hava kannað gentuna, eru komnir til somu niðurstøðu.

Sjálv sigur gentan við blaðið, at hon hevur altíð havt hesi evnini, men at fólk hava havt ilt við at trúgva hana, men nú hava læknarnir so staðfest, at tað er so. Sambært kanningunum er tað bara í dagsljósi, at gentan hevur evni til at síggja ígjøgnum mannakroppin.

Um kanningina á barnasjúkrahúsinum í Saransk skrivar Izvestija, at læknarnir lótu ta 16 ára gomlu gentuna hyggja at fólki við ymsum sjúkum, og í hvørjum einasta føri samsvaraðu upplýsingar hennara við tað, sum sjúklingunum bagdi.

## Vóna at finna svar á brúnni

**Kanska kunnu tólini á brúnni vísa, hví farmaskipið "Rocknes" holvdist**

Gjáramorgunin fóru fleiri sleipibátar undir at toga norska farmaskipið "Rocknes", sum holvdist í Vattlestraumen nærhendis Bergen. Ætlanin er at venda skipinum aftur á rættkjøl.

Enn veit eingin við vissu, hví skipið holvdist, men hildið verður, at tað kann hava tikið botn onkunstaðni, og at hol er komið á ein av barlasttangunum. Norska løgreglan hevur avhoyrt loðsin, sum slapp livandi frá vanlukkuni, og nú vónar løgreglan, at tólini á brúnni á skipinum kunnu loysa gátuna um vanlukkuna, sum kravdi 13 mannalív.




## Vippuvognur 3,5 T



Nýttur til framsýning. Seldur við munandi avsláttri.

**Hansen, tlf. 218540**

## Bilur við skaða til sølu!

Fyri P/F Trygd selja vit ein 4-hjólstrektan Toyota Rav 4 við skaða.
Árg.: Januar 2003
Motorur: 2,0 Turbo Diesel
Km.: 27.000

Bilurin verður seldur fyri hægsta boð yvir Kr. 40.000,- sum hann stendur við skaða.




**P/F Reyni Service**
Bilasølan
Tlf. 353040

## Bilmekanikari

Søkt verður eftir royndum bilmekanikara at byrja sum skjótast.

Ringi til Heðin ella Finnboga á

**Tlf. 345400**

P/F Meinhardt Arge

## Tøkk fyri stuðulin

*Ein hjartans tøkk til eysturoyingar, ið stuðlaðu Sambandsflokkinum til valið 20. januar 2004.*

*Ein serstøk tøkk til tykkum 366, sum stuðlaðu mær persónliga.*



Vinarliga
**Frithleif Olsen**

***Leikhúsið Gríma***

framførir

## *Føroyingasøgu*

***Leikur fyri øll***

Leikstjórn Ria Tórgarð

á Meiarínum

| | |
|---|---|
| **hósdagin** | **29. januar kl. 20.00** |
| **fríggjadagin** | **30. januar kl. 20.00** |
| **leygardagin** | **31. januar kl. 16.00** |
| **sunnudagin** | **1. februar kl. 16.00** |

Atgongumerki: á kr. 80,-

fáast á Kunningarstovuni ella við dyrnar 1 tíma undan sýning.

## Tøkk



*Øllum tykkum, sum stuðlaðu Tjóðveldisflokkin á valinum farna, takki eg hjartaliga.*

*Ein serstøk tøkk til tykkum norðoyingar, sum stuðlaðu mær persónliga.*

*Vinarliga*

**Heini O. Heinesen**
http://heima.olivant.fo/~hoyh/

## Tøkk



*Boðskapurin var týðiligur og stevnumiðini greið. Tí ivaðust tit ikki um, hvønn tit valdu. Og vit vita hví og kenna ábyrgdina. Hjartaliga takka vit tykkum mongu, - veljarar, stillarar og hjálparfólk - sum so dyggiliga mannaðu garð um Miðflokkin og okkum persónliga á valinum.*

*Føroyingum øllum ynskja vit Harrans ríku signing í komandi tíðum.*

**Bill Justinussen og Jenis av Rana**

## Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið í samband við gerð av eini útstykking Úti í Gerðinum á Eiði boðin út í almenna lisitatión.

Arbeiði fevnir í stuttum um gerð av einum uml. 200 m longum vegi og byggibúning av 13 grundstykkjum.

Lisitatiónin verður á kommunuskrivstovuni á Eiði hósdagin 26. februar 2004 kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast til í seinasta lagi hósdagin 5. februar við at gjalda kr. 5.000,- í veðhaldi á konto 6460-165 7404 í Føroya Banka.

Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent, í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

**Sp/f Teknistovan**
v/Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen, ráðg. Byggifrøðingar
FO-510 Gøta
Tel.: 442105 – Fax: 442107
email: klement@post.olivant.fo

**Frá Føroya Postfelag:**

## Aðalfundur 2004

Aðalfundur felagsins verður í HB-húsinum tann 28. februar kl. 10.00.

Uppskot frá limunum skulu skrivliga verða nevndini í hendi í seinasta lagi 3 vikur áðrenn aðalfundin.

**Limaveitsla**
Nevnast skal, at veitsla verður í HB-húsinum sama dagin.
Tilmeldingarskriv hesum viðvíkjandi verður sent øllum limum.

**Nevndin**

## Bilar við skaða til sølu

**Tryggingarfelagið Føroyar hevur bilar við skaða til sølu á heimasíðuni**

**www.trygging.fo**
**Tel. 345600**

Í løtuni kanst tú t.d. bjóða uppá ein Nissan Primera, Saab 9-5, Honda CR-V, Peugeot 307, Opel Astra, Citroën Saxo, Peugeot 306, Daihatsu Sirion og Toyota Yaris.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Tel. 345600 · fax 345607
Sýnsmennirnir eru at hitta:
Mána- til hósdag kl. 8.30-10.00 og 15.00-16.00
og fríggjadag frá kl. 8.30-12.00 og 13.00-16.00